# ARBEIÐSEFTIRLITIÐ

*Administration of Occupational Safety and Health*

Fútalág 1B ✪ P.O.Box 1134 ✪ FO-110 Tórshavn ✪ Faroe Islands

Tlf. +298 317811 ✪ Fax +298 314489 ✪ E-mail: info@arbeidseftirlit.fo



***Skrásetingar nr.:***

**L-A005-4**


# Leiðbeining um nýtslu av trygdarhjálmum

Henda leiðbeining fevnir um nýtslu av trygdarhjálmum. Undantiknir eru háhitahjálmur (sum sløkkilið nýta), ferðslutrygdarhjálmar, ríðingarhjálmar, ítróttarhjálmar, trygdarhjálmar o.l.

***Nýtsla.***

Trygdarhjálmur skal nýtast, har arbeiðið ikki á annan hátt kann tryggjast.Trygdarhjálmur skal altíð nýtast á arbeiðsplássum, har vandi er fyri at fáa skaða í høvdið.

Trygdarhjálmur skal nýtast:

- har vandi er fyri at fáa tilfar, amboð ella aðrar lutir yvir seg, sum t.d. kunnu koppa, fara á glið, syftast ella rapa,

- har vandi er fyri at fáa stoyt av lutum, sum peiggja útum, eins og hangandi og sveiggjandi byrðum,

- tá arbeitt verður við óbjálvaðum el-leiðingum,

- tá arbeitt verður á trongligum øki, og møguleiki er fyri at verða kleimdur.

Trygdarhjálmur er sostatt eitt krav á flestu byggi- og anlegsarbeiðsplássum, og har arbeitt verður við boltapistóli, íkrøkjarum, træhøgging, umframt tá arbeitt verður í brunnum, tunnlum og fjarhitarørum o.l.

***Sølumaðurin.***

Sølumaðurin skal bert selja trygdarhjálmar, sum hava frámerkið "Dansk Standard", møguliga saman við øðrum Norðurlendskum góðkenningarmerki.

***Lógarheimild:***

Kunngerð nr. K-A005-1 um persónliga verndarútgerð frá 4. september 1995.
Kunngerð nr. K-A005-2 um trygdarkrøv til persónliga verndarútgerð frá 4. september 1995.

| *Útgivið fyrstu ferð:* | ***Seinastu broytingar:*** |
| --- | --- |
| **1. mars 1992** | |

Undantiknir eru trygdarhjálmar til serstøk endamál, sum Arbeiðseftirlitið hevur góðkent og sum ikki eru merktir “Dansk Standard”. Í slíkum førum er merki á hjálminum, sum sigur frá hesum loyvi.

***Arbeiðsgevarin.***

Arbeiðsgevarin skal síggja til:

- at arbeiðsfólkið fær handaðan hóskandi trygdarhjálm, sum ikki er til óneyðugan ampa undir arbeiðinum.

- at arbeiðsfólkið verður leiðbeint um nýtslu og vandan við ikki at nýta trygdarhjálm.

Leiðbeiningin skal fevna um røttu stødd av hjálmi, viðlíkahald og hvussu hjálmurin skal goymast.

Arbeiðsgevarin útvegar og rindar trygdarhjálm, sum eisini er hansara ogn.

***Starvsfólk.***

Skulu nýta trygdarhjálm, har tað er neyðugt.

***Brúkaraleiðbeining.***

Tá sølumaðurin letur trygdarhjálm, skal brúkaraleiðbeining á føroyskum ella donskum máli vera tøk, sum upplýsir um verjueginleikar, hvussu hjálmurin skal sita, nýtslu og viðlíkahald og hvussu hann skal goymast.

***Skelti.***

Arbeiðsgevarin skal síggja til, at arbeiðsøkið, har trygdarhjálmur skal nýtast, er merkt við skeltinum:
Skeltið er blátt við hvítum tekni, ið upplýsir um slag av trygdarhjálmi.

Dømi kunnu vera um arbeiðsøki sum er so spjatt, at tað ikki er praktiskt møguligt at seta skelti upp, hóast trygdarhjálmur er kravdur.



***Vernd og eginleikar.***

Sambært Dansk Standard verða trygdarhjálmar nevndir framleiðsluhjálmar og eru býttir upp í tvey sløg av hjálmum: A og B.

***A-hjálmar***

A-hjálmar verja móti stoyti á hjálmkollan og forða fyri, at spískar lutir koma at høvdinum. A-hjálmar kunnu hava hjálmreim, sum verður fest undir øsini. Umframt frámerkið “A-hjálmur”, er hesin eisini merktur við upplýsing um at han er hitaroyndur, antin við 20 ella 30 hitastigum. Hetta hevur týdning fyri hjálmar, sum t.d. verða nýttir í frystihúsum og aðrastaðni, har arbeitt verður í lágum hitastigum.

***B-hjálmar***

B-hjálmar hava - umframt verjueginleikarnar í A-hjálmum - eisini vernd móti kleimiskaðum og verja teir sostatt eisini móti trýsti á skalla og vanga. B-hjálmar skulu hava møguleika at festa høkureim, men henda nýtist ikki at verða fest í hjálmin. Umframt frámerkið “B-hjálmur”, hava hesir eisini frámerkið, at teir eru hitaroyndur við 20 ella 30 hitastigum.

Ávísir trygdarhjálmar - bæði A- og B-hjálmar - varðveita upprunaligu styrkina, hóast teir hava verið fyri ávísari upphiting. Hesir hjálmar eru merktir “AV” og “BV”.

### *Hjálmskap*.

Trygdarhjálmar hava tvey ymisk skap, sum nevnast hattasniðið og húgvusniðið.
Hattasniðïð hevur breiðan skugga, sum vendir niðureftir.



Húgvusniðið hevur smalan skugga við túti.



Húgvusniðið hevur tút og regnskugga.



Hattasniðið veitir størstu verju, av tí at nakki, oyru og lutvíst herðar verða vard. Breiði skuggin kann vera til ampa, tá lutir skulu berast á herðunum, og tá arbeitt verður í trongum rúmum.

### ***Hvønn trygdarhjálm skulu vit velja.***

Tá trygdarhjálmur skal útvegast, skal hugsast um, hvat slag av arbeiði hann skal nýtast til. Er vandi fyri kleiming, skal B-hjálmur nýtast. Hetta er galdandi fyri arbeiði innan byggi- og anlegsvirksemi og skipasmiðjur.
Er vandi fyri at fáa lut ella annað í høvdið og har arbeitt verður við boltpistóli, er skilagott at nýta hattasniðið, sum er úr haldgóðum duroplast og útgjørt við hjálmglugga (visir).

Hjálmur úr duroplast kann nýtast til arbeiði í heitum arbeiðsumstøðum, men má ikki sammetast við háhitahjálm, av tí at duroplast bert er tryggt upp til 200 °C.

Er vandi fyri at nerta við ravmagn, skal hjálmur nýtast eftir reglunum í sterkstreymsreglugerðini (deild A, partur 5 og 5A).

Umframt hetta kunnu grundir verða fyri at velja serligan lit ella skap. T.d. eigur trygdarhjálmur hjá fólki, ið arbeiðir við íkrøkjara at hava sterkan lit, so viðkomandi er sjónligur fyri kranføraranum.

Tá arbeitt verður í kulda ber til

- at vera í húgvu undir hjálminum
- bjálva hjálmin uttan
- bjálva hjálmin innan.

Nýtið bert útgerð, sum situr til hjálmin, so trygd fæst fyri at verjueginleikarnir ikki verða oyðilagdir.

Í øllum arbeiði, har vandi er fyri at trygdarhjálmurin t.d. fýkur av, orsakað av vindi, skal hjálmurin hava reim. Trygdarhjálmur við reim kann tó verða ein vandi, um t.d. okkurt kemur fyri reimina. Er slíkur vandi hugsandi, skal reimin verða soleiðis fest, at hon fer upp av sær sjálvum, um hon verður spent meir enn ávíst mát.

Skal trygdarhjálmurin eisini hava innbygd hoyrivernd ella oyravernd, skal hjálmurin verða gjørdur til slíka eyka útgerð.

Trygdarhjálmar mugu ikki sproytast við evni móti smákyknum (antiinsektspray). Loysingarevnið kunnu ávirka tilfarið í hjálminum.

***Passing og viðlíkahald*.**

Trygdarhjálmur skal vera passaligur til tann persón, sum skal bera hann. Tað er umráðandi fyri trygdina, at hjálmurin situr væl á høvdinum og at fjarstøðan millum hjálmin og høvdið er í lagi.

Tá trygdarhjálmurin skal passast til er umráðandi at
- skallabandið liggur at høvdinum,
- sveittareimin liggur at høvdinum,
- fjarstøðan frá niðara kanti av sveittareim til punktið, har skallabandið rennur saman, er 80 og 90 mm,
- fjarstøðan millum hægsta punkt á skallanum og hjálmkollinum innan er minst 25 og hægst 50 mm,
- fjarstøðan millum hjálmin og sveittareim er hægst 20 mm og ongastaðni kring hjálmin er minni enn 5 mm,
- hjálmurin er passaligur við ongari reim og situr væl, eisini tá tú vikar høvdið.

Allir trygdarhjálmar kunnu vaskast við heitum sápuvatni upp til 45 hitastig.

Trygdarhjálmur, sum hevur fingið rivur, ella sum hevur verið fyri ógvusligum ávirkanum t.d. hevur fingið stoyt ella er kleimdur, skal vrakast.

Neyðugt er við jøvnum millumbili at skifta bjálvingina innan út. Eitt nú tí sveitti, skittur og hiti kann hava ta ávirkan, at bjálvingin skjótari spillist enn hjálmurin. Kannað hjálmbjálvingina við jøvnum millumbili og skiftið hana út eftir fyriskriftum, sum sølumaðurin vísur á, tó í seinasta lagi tá tilfarið í hjálmbjálvingini broytir útsjónd.

Er ivamál um trygdina, skal hjálmur/bjálving skiftast út. Arbeiðsgevarin skal rinda útreiðslurnar til viðlíkahald.

Trygdarhjálmar skulu goymast har sólin ikki sleppur at, í vanligum, jøvnum hita fyri ikki at oyðileggja tilfarið.

***Haldgóðska*.**

Tilfarið í trygdarhjálmum kunnu ávirkast, um hjálmurin verður fyri kulda, hita bjørtum ljósi, sveitta og evnum, sum verða nýtt at koyra í hár ella á holdið, eins og um óhóskandi vaskievni verða nýtt.
Upplýsing um tilfar og eginleikar í trygdarhjálminum, tá hann hevur verið nýttur í longri tíðarskeið, kunnu fáast frá sølumanninum.
Hjálmkollurin verður oftast gjørdur úr termoplast ella duroplast.

***Yvirlit yvir tilfar og eginleikar:***

| Høvuðsbólkur | Termoplast | | | | Duroplast |
|---|---|---|---|---|---|
| Tilfar | Poly-ethylen | ABS-poly-merisat | Polyamid | Poly-carbonat | Phenol-Textil Polyester-glastrevja |
| Haldgóðska við elli | minni góð | góð | minni góð | góð | sera góð |
| UV-góðska | nóg góð | nóg góð | nóg góð | nóg góð | sera góð |
| Formfast í hita | upp til uml. + $70^0$C | upp til uml. +$90^0$C | upp til uml. +$150^0$C | upp til uml. +$130^0$C | upp til uml. +$200^0$C |
| Bræðingar-mark | +$150^0$C | +$180^0$C | +$220^0$C | +$230^0$C | kolast upp yvir $1000^0$C |
| Brotstyrki í kuldi | sera góð upp til -$40^0$C | góð upp til -$20^0$C | góð upp til -$20^0$C | góð upp til -$30^0$C | sera góð óavmarkað |
| Tekur upp vætu | eingin | sera lítil (0,2%) | vanligt (2-3%) | sera lítil (0,2%) | sera lítil (0,3%) |
| Møguleikar at moyrna | eingin | eingin | eingin | eingin undantikið evnislig ávirkan | eingin |
| Evnislig gøðska | góð undantikið olju og feitt | góð undantikið sýru | góð undantikið sýru og lútur | sera góð undantikið alkalisk evni, am-moniak og sterka sýru | góð |

**ARBEIÐSEFTIRLITIÐ,** 1. mars 1992

Eli Davidsen, stjóri